KÍF-stÍF-27-30 (10-14):

# Strandingar hildu tørn

**Strandingar vunnu á kollfirðingum í Vestmanna, men móti endanum var um reppið, at kollfirðingar fingu strandingar aftur**

HONDBÓLTUR, MENN
*Sveinur Tróndarson*



*Strandingar knógvaðu kollfirðingar í seinasta útidystinum, og nú restar bert dysturin móti nummar tvey á talvuni*

Strandingar vístu ongan vælvilja móti kollfirðingum tá liðini møttust í dysti í Vestmanna sunnudagin. Strandingar gjørdu stutta prosess og vunnu dystin við 30 málum móti 27 eftir hálvleiksstøðuna 14-10.

Tað var longu tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin, at strandingar høvdu lagt seg so mikið á odda, at teir kundu brúka orkuna um sítt egna spæla.

Tá tað er sagt mugu vit tó leggja afturat, at tá tað leið fram móti dystarenda var um reppið, at kollfirðingar komu inn aftur í dystin. Tí tá tað restaðu seks minuttir fingu kollfirðingar tveir gyltar minuttir, har teir minkaðu um munin úr 23-29 til 27-29, men so var orkan uppi. Strandingar fingu seinasta málið og dysturin endaði við 30-27 sigri til strandingar.

## Enn eina roynd

Dysturin í Vestmanna hevði ongan týdning fyri strandingar, men fyri kollfirðingar hevði hann so mikið nógv at siga, at vunnu teir, sluppu teir av niðastu rók. Hetta lítið unniliga plássið hevur verið teirra nú í eina tíð og sjálvt um tað einki kostar at liggja har, hevur tað sálarligan týdning fyri kollfirðingar at sleppa upp á næstaftasta pláss í landskappingini.

Tað eydnaðist ikki í fyrsta umfari, men teir fáa enn ein – og tað verður eisini tann allar seinasti í ár – møguleika afturat í ár. Tað verður tá teir skulu vitja hoyvíkingar næsta leygardag og tað er mikið passandi, at hesi bæði liðini bresta saman. Tey liggja á teimum báðum niðastu plássunum við einum stigi ímillum, og tað merkir, at vinna kollfirðingar fara teir fram um, men tapa teir, vera teir liggjandi har teir eru.

So boðini eru greið og tað eru tey eisini hjá hoyvíkingum, sum, hóast teir hava eitt gott og ungt lið, ikki hava staðið seg so væl í ár.

## Neistin næstu ferð

Hjá strandingum er árið eisini liðugt, men teir hava enn ein setning at greiða. Teir sleppa nevniliga at vera við til at gera av, hvør skal gerast Føroyameistari í manshondbólti í ár, og verið vís í, at henda leiklut taka teir í fullum álvara.

Neistin kemur inn á Skála at vitja og eru strandingar líka uppsettir móti Neistanum sum teir vóru móti VÍF, so verður talan um ein branddyst. Nú eiga teir ikki einasta orðið í hesum máli, tí vestmenningar skulu sjálvir spæla móti Kyndli og tí verður ein partur av stríðnum avgjørdur har.

Samanumtikið kunnu vit tí siga, at vit eiga enn eitt spennandi hondbóltsvikuskiftið á í ár, og tað fara vit at njóta ...

**Dysturin í tølum:**
**Málskjúttar:**
KÍF: Durica Tomic 6 (3), Jákup Dam 6 (2), Eddie Joensen 5, Regin Petersen 4, Kristian Madsen 4, Petur M. Poulsen 1 og Hallur Hansen 1
StÍF: Alexandur Johansen 7, Costin Dumistrescu 6 (3), Artur Johansen 6, Jón Rasmussen 5, Bent Djurhuus 4 og André F. Danielsen 2
Brotskøst: KÍF 7, StÍF 3
Útvísingar: KÍF 5, StÍF 4

VÍF-VB 25-26 (12-12):

# So tapti VÍF

**Føroyameistararnir úr Vestmanna snávaðu – fyri fyrstu ferð í ár – tá VB var á vitjan um vikuskiftið. Vágskvinnur vistu, at skal tað eydnast teimum at vinna heiðursmerkir í ár var neyðugt at vinna í Vestmanna. Tað gjørdu tær og tí kunnu tær nú sjálvar gera av, um tær skulu hava bronsumerkini**

HONDBÓLTUR, KVINNUR
*Sveinur Tróndarson*



*Fyri fyrstu ferð í tvey ár snávaðu kvinnurnar hjá VÍF, tá tær á heimavølli máttu lúta fyri VB*

VÍF megnaði ikki at koma ósigrað gjøgnum kappingarárið 2001/2002. Hesum syrgdi VB fyri tá liðini hittust í høllini í Vestmanna leygardagin. Vágbingar vunnu dystin við minst møguligu margin, men tað var nóg mikið til sigurin.

## Sera vónbrotnar

Sum skilligt er, vóru vestmannakvinnur serstakliga vónbrotnar eftir dystin. Gamaní var talan um ein dyst, sum ikki hevði stórvegis annað at siga enn, at tær kundu fara ósigraðar gjøgnum hetta árið, men fyri meistararnar átti tað at verið nóg mikið.

At hetta so samstundis var seinasti landskappingardystur á heimavølli átti eisini at sett VÍF kvinnurnar so mikið upp, at tær vunnu dystin.

Men so var ikki. VB-kvinnurnar vóru nógv meira uppsettar enn vertirnir og tað hevði við sær, at VÍF ongantíð fekk frið at spæla sítt spæl, og tá samanumkom vóru tað so vágbingarnir sum vóru omaná.

Men VB hevði eisini av álvara nakað at spæla fyri í Vestmanna. Tær vistu tá tær fóru á vøllin, at um tær ætla sær bronsumerkir í ár, var treytin ein sigur í Vestmanna, tí næsta vikuskiftið kemur Stjørnan, sum í løtuni liggur á triðja plássi til Vágs á vitjan og við einum sigri í hesum dystinum, kann VB sníkja seg fram um Stjørnuna í allar seinasta umfarinum og á tann hátt tryggja sær bronsuna.

## Spældu ikki væl

Sum sagt vóru VÍF kvinnurnar sera vónbrotnar um seinasta avrikið á heimavølli í ár. Tær ætlaðu sær at vera ósigraðar í ár, men soleiðis skuldi ikki ganga, og Sóley Mikkelsen, liðskipari hjá VÍF, sigur, at allar eru vónbrotnar av avrikinum leygardagin

– Hugburðurin var ikki tann rætti. Hugurin at spæla var heilt einfalt ikki nóg góður og tað ber ikki til, tá tú spælir móti VB og slett ikki tá tær hava nakað at spæla fyri. Triðjaplássið hevur týdning fyri tær og tí vistu vit, at tær fóru at berjast fyri sigrinum. So mikið verri er tað, at vit ikki megna at seta okkum upp til dystin, sigur Sóley.

Hon leggur afturat, at alt VÍF liðið sum tað er, má taka ábyrgdina fyri tapinum. Eingin leikari leikti upp til vanligan standard.

– Men veruleikin er, at tað er trupult at seta seg upp til ein slíkan dyst, tá kappingin er vunnin og av fyri okkara viðkomandi, og tað var kanska orsøkin til at vit spældu sum vit spældu.

## Venjarin ábyrgd fyri reyðum korti

Annars fekk dysturin í Vestmanna ein løgnan enda. VB, sum í 29. minutti hevði lagt seg á odda, lá til at vinna dystin, tá venjarin við veipum og rópum móti dómaranum, brokkaði seg til eina útvísing í tveir minuttir, og ein slík útvísing merkir, at ein leikari skal av vøllinum. Henda broyting í leikreglunum varð framd undan hesum kappingarárinum, fyri at venjarin ikki skal hava møguleika at uppføra seg sum eitt býtt uttan at fáa revsing fyri tað.

Sum rætt er, krevja dómararnir, at ein leikari skal av vøllinum, og dómarin ger av, at Regina Radó skal út. Hon skilir á venjara sínum, at dómararnir hava víst henni á vølli og so fleyg øði í hana.

Hon rópti og garteraði so nógv á vøllinum, at dómararnir vístu henni reyða kortið og tað merkti, at hon mátti av vøllinum alt fyri eitt.

Tað er so eitt, at hon mátti út í Vestmanna. Tað sum er verri er, at hon av somu orsøk ikki verður við í seinasta dystinum hjá vágbingum, sum verður móti Stjørnuni og hesin dysturin er so sera týdningarmikil fyri VB.

Tað sum ger gøluna fullkomna er, at Regina Radó als einki skeivt hevði gjørt. Dómararnir vístu ikki henni av vølli men venjarin fekk tveir minuttir fyri óhøviskan atburð, men tá hann tekur Reginu út, kloddar hann í tí og sigur henni, at dómararnir vilja hava hana út. Hetta – sigur annar dómarin – var ikki so. Venjarin avgjørdi sjálvur at taka hana út.

At so øði spinnur í Reginu á veg út ger bara at dómarin verður noyddur at senda hana av vøllinum, og tað er spell.

Spurningurin er nú, hvønn týdning tað fær fyri dystin hjá VB móti Stjørnuni. Lítið er at ivast í, at liðfelagar hennara fegnar vildu havt hana við, men sambært reglunum hevur hon ikki loyvið til tess. Og tað ger stríðið hjá VB at røkka silvurinum nógv torførari, tí Regina hevur verið liðnum ein hollur stuðul í ár.

**Dysturin í tølum:**
VÍF: Joana Rapa 12 (6), Nicoleta Radu 6, Sóley Mikkelsen 3, Barbara á Rógvi 2, Fríða Marjunardóttir 1 og Alis Høghamar 1
VB: Laila Jespersen 8, Regina Radó 5 (1), Gabriela Feketé 4, Eyðbritt Krosslá 3, Sólrun Krosslá 2, Durita Rouch 2, Margret Augustinussen 1 og Rannvá Augustinussen 1
Brotskøst: VÍF 8, VB 2
Útvísingar: VÍF 1, VB 3
Burturvísing: VB 1



VÍF-H71 39-26 (18-12):

# Vestmenningar aftur á odda

**VÍF liggur nú aftur best fyri at vinna meistaraheitið í manshondbólti. Teir vunnu stórt í seinasta heimadystinum á árinum og hava nú bara klassikaran móti Kyndli eftir. Og sjálvt um munurin á liðunum er størri nú enn fyrr, kunnu vit bara vísa til, hvat hendi í flogbóltslandskappingini tá Fleyr og Mjølnir hittust á seinasta leikdegi**

HONDBÓLTUR, MENN
*Sveinur Tróndarson*



*VÍF reistist eftir tvey tap, tá teir sópaðu mótstøðuna frá H71 burtur leygardagin*

Vestmenningar standa nú við bestu møguleikunum til at vinna meistaraheitið í manshondbólti í ár. Hesum syrgdu teir sjálvir fyri tá teir vunnu stórsigur móti hoyvíkingum á heimavølli leygardagin.

Dysturin endaði við 39-26 sigri til vestmenningar eftir støðuna 18-12 í hálvleikinum.

Tey, sum hava áhuga fyri rokning síggja beinanvegin, at støðan í hálvleikinum lutfalsliga er júst tann sama sum endaliga støðan, og tað kunnu vit brúka til at staðfesta, at vestmenningar vóru helmingin betri enn hoyvíkingar, ella, at hoyvíkingar formáddu sær bara tveir triðingar av tí, sum vestmenningar gjørdu.

## Nú sær bjartari út

Úrslitið av dystinum í Vestmanna leygardagin hevur við sær, at tað nú sær munandi bjartari út við FM-heitinum hjá vestmenningum. Undan seinasta heimadystinum móti Neistanum skuldi »bara« ein heimasigur til so vóru teir gulu meistarar, men sum kunnugt endaði dysturin við sigri til Neistan.

Eftir tað hava vestmenningar eisini tapt móti strandingum, so tað var eitt krav til vestmenningar, at dysturin móti H71 skuldi vinnast um teir ætla sær at gerast meistarar við egnari hjálp.

Hendan møguleikan hava teir nú, men tað krevur, at teir vinna dystin móti Kyndli og havandi í huga, at Kyndil ikki hevur havt eydnuna við sær í ár, mugu vit siga, at vestmenningar eru stórfavorittar til sigurin móti teimum grønu – og harvið eisini til FM-heitið.

Men samstundis mugu teir hugsa um tað, sum hendi á seinasta leikdegi í flogbóltslandskappingini. Her lá Fleyr á odda og sannlíki, at teir fóru at vinna meistaraheitið var øgiliga stórt. Teir høvdu jú bara Mjølnir á heimavølli og Mjølnir lá aftast í landskappingini...

Jú, gomorin. Fleyr tapti móti Mjølnir og tí gjørdist Fram meistari og soleiðis kann tað eisini ganga í hondbóltskappingini. Vinnur Kyndil í Havn kann Neistin tryggja sær FM-heitið við at vinna á StÍF á Skála, og sjálvt um tað kann vera ein stórur biti at gloypa vita vit, at tað ikki er ómøguligt.

## Hoyvíkingar liggja tungt

Liðini sum leiktu í Vestmanna leygardagin liggja í hvør sínum enda av stigatalvuni og kósin hjá teimum hevur eisini verið hvør sín veg. Vestmenningar hava havt píl uppeftir meðan hoyvíkingar hava verið í fríum falli í bestu deildini.

Næsta vikuskiftið fáa teir so eitt høvið til at steðga fallinum. Tað verður tá teir hitta KÍF í seinasta dystinum í ár, og so er spurningurin um teir megna tað.

Einki er at ivast í, at liðið er gott. Leikararnir – burtursæð frá onkrum veterani – er ungt og átti at kunna víst meir, men tað hevur verið trupult at fingið spælið at hingið saman í ár. Kollfirðingar hava hinvegin eisini nakað at prógva, tí felagið hevur satsað við tveimum útlendingum í ár, tó uttan at tað hevur givið tað úrslitið teir høvdu vónað.

Nú hava teir so enn ein møguleika at vísa, at tað er dugur í teimum, men hvussu úrslitið verður av tí mugu vit bíða eftir.

**Dysturin í tølum:**
VÍF: Áki Olsen 10 (1), Ingi Olsen 9 (1), Daniel Rapa 7, Sámal Joensen 6 (2), Johnny Joensen 3, Ragnar Zachariasen 3 og Rógvi Nielsen 1
H71: Johnny Djurhuus 10, Bjarni Wardum 7, Kristian Petursson 4, Jákup S. Simonsen 3, Olaf Vestergaard 1 og Anfinn Debess 1
Brotskøst: VÍF 6
Útvísingar: VÍF 3, H71 1
Dómarar: Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen.


Sosialurin & Internet Sosialurin

ÓKEYPIS





Nú Sosialurin fyllir 75 ár í ár, so ber tað til at gerast haldari av Sosialinum ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum. Samstundis loyva vit okkum at senda tykkum eitt uppkrav fyri aprílársfjórðing.

Tíðindablaðið
Sosialurin
BOX 76
110 Tórshavn

Undirritaði ynskir at fáa Sosialin sendandi ókeypis í mars mánað og fær uppkrav fyri aprílársfjórðing sendandi

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Post nr., bygd, býur:
Telefon
e-mail:
Undirskrift: